# Botnuppgerð á Argjum

**VODAFONEDEILDIN** Tað hevur gingið illa í hond hjá argjamonnum í ár. Teir hava bara skavað sær trý stig saman og liggja niðast. FC Suðuroy fekk ein góða byrjan uppá kappingarárið, men hava síðani havt tað trupult og eru endaðir í botninum

Tróndur arge

– Nú tá vit liggja niðast við bara trimum stigum, so er tað eitt krav at vit skulu vinna dystin. Hetta er ein seks stigsdystur sum vit ikki hava ráð at tapa, sigur AB leikarin, Dion Splidt.

FC Suðuroy byrjaði kappingarárið við spæla 4-4 í Gundadali ímóti HB. Tann dysturin vísti hvat FC Suðuroy kann, tá teir spæla upp til sítt besta.

– Fyri okkum er tað týdningarmikið at vit ikki tapa dystin um vit vilja yvirliva í Vodafone deildini. Vit skulu helst hava trý stig tá vit spæla



*Dion Splidt í dysti fyri AB móti B71*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Hetta er ein seks stigsdystur sum vit ikki hava ráð at tapa

DION SPLIDT

á heimavølli og eitt á útivølli, Jón Pauli Olsen, venjari hjá FC Suðuroy.

Báðir partar halda seg at spælt ov álopskent seinastu dystirnar og tað hevur kostað á stigatalvuni.

– Vit hava í ár roynt at spæla meiri álopskendan fótbólt. Vit skoraðu eisini nógv mál fyrstu dystirnar, men tað hevur gjørt tað tunt í verjupartinum og tí hava vit ikki vunnið dystirnar. Nú fella vit aftur til tað, ið vit gjørdu so væl í fjør og taka tað har frá, sigur Dion Splidt.

– Vit hava satsað eitt sindur seinastu tríggjar dystirnar, men í avgerandi løtum hevur tað ikki koppað okkara veg. Vit hava spælt betri fótbólt, men stigini hava manglað, sigur Jón Pauli Olsen.

Fyri FC Suðuroy kemur tað væl við, at Dan Djurhuus er tøkur aftur. Hjá argjamonnum er Morten Overgaard skaddur og málmaðurin, Tórður Thomsen, hevur leikbann.

*trondur@sosialurin.fo*

## Føroyska Vodafonedeildin

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 8 | 5 | 2 | 1 | 15 | 11 | +4 | 17 |
| 2 | Víkingur | 8 | 4 | 3 | 1 | 17 | 12 | +5 | 15 |
| 3 | ÍF | 8 | 4 | 3 | 1 | 11 | 6 | +5 | 15 |
| 4 | NSÍ | 8 | 4 | 1 | 3 | 16 | 9 | +7 | 13 |
| 5 | B36 | 8 | 3 | 3 | 2 | 14 | 13 | +1 | 12 |
| 6 | EB/Streymur | 8 | 3 | 2 | 3 | 12 | 11 | +1 | 11 |
| 7 | B68 | 8 | 3 | 1 | 4 | 17 | 17 | 0 | 10 |
| 8 | FC Suðuroy | 8 | 1 | 3 | 4 | 11 | 17 | -6 | 6 |
| 9 | B71 | 8 | 1 | 3 | 4 | 9 | 17 | -8 | 6 |
| 10 | AB | 8 | 0 | 3 | 5 | 11 | 20 | -9 | 3 |



*Víkingar vænta sær ein harðan dyst frá fuglfirðingum, serliga eftir sigurin hóskvøldið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Grannauppgerð í Gøtu

**VODAFONEDEILDIN** Fyri aðru ferð uppá fýra dagar bresta Víkingur og ÍF saman. Hesa ferð í landskappingini. Báðir partar siga at hálvfinalan hóskvøldið onga ávirkan kemur at hava á dystin

Tróndur Arge

– Hon kemur onga ávirkan at hava á okkum. Hetta er ein nýggur dystur og vit fara til Gøtu fyri at vinna. Tað gera vit til hvønn dyst og hesin er einki undantak, sigur liðskiparin hjá ÍF, Poul Ennigarð.

Víkingur hevur framvegis ikki tapt fyri ÍF í Fuglafirði. Í gjár vunnu teir 2-1 í steypakappingini.

– Vit skulu altíð vinna tá vit eru á heimavølli, men hesa ferð verður tað harðari enn nakrantíð, tí vit akkurát hava vunnið í Fuglafirði. Vit velja at gloyma hasa hálvfinaluna í eina tíð og hugsa bara um hendan dystin. Vit hava allir verið í ísbað eftir sigur hóskvølið, so vit eru klárir, sigur ein smílandi Atli Gregersen.

Víkingur og ÍF liggja lið um lið í landskappingini á ávíkavist øðrum og triðja plássi. Bæði hava 15 stig, tvey minni enn HB, ið liggur fremst.

– Vit vita at HB ella B36 seta stig til í havn, so tað er týdningarmikið at vit vinna dystin. Fótbóltsfeburin í Gøtu og Leirvík er høgur og vit skylda viðhaldsfólkinum ein sigur. Dysturin hevði eisini givið okkum

## Vit skulu altíð vinna tá vit eru á heimavølli, men hesa ferð verður tað harðari enn nakrantíð, tí vit akkurát hava vunnið í Fuglafirði

ATLI GREGERSEN

rættindini at happa teir í góðar tvær vikur fram til seinnu hálvfinauna, sigur Atli Gregersen.

ÍF hevur vunnið tríggjar teir seinastu dystirnar í landskappingini. Seinasta vikuskiftið gjørdu teir enda á HB sum ósigrað.

– Tað er ongin vanlukka um vit tapa, men ein sigur hevði eisini hjálp væl uppá sjálvsálitið til seinnu hálvfinaluna, sigur Poul Ennigarð.

Hjá ÍF er Høgni Zachariassen langtíðar skaddur. Rógvi Jacobsen var ikki við hóskvøldið, men verður møguliga við mánadagin.

*trondur@sosialurin.fo*